listastevna føroya arts festival

# Góð ráð til Listastevnuna

Nú Listastevna Føroya er í gongd fyri triðju ferð, hevur hon longu sligið seg fasta sum Føroya mest stórsligna mentanartiltak. Tað gevur henni eina stóra ábyrgd mótvegis samlaða føroyska mentunarlívinum, og tí fær hon her nøkur vegleiðandi orð við á vegnum frá tveimum teimum royndastu listastevnufyriskiparunum í Føroyum



*- Man má avgera við sær sjálvum, um man heldur vil taka 200 krónur og spæla fyri hálvari høll ella man vil taka 100 krónur og spæla fyri fullari høll, sigur Brandur Øssursson*



*- Tað er galdandi fyri alt listarligt arbeiði, at tað nyttar lítið at brenna alt fýrverkið av nýggjársaftan og so ikki eiga so mikið sum eina rakett til restina av árinum, sigur Kristian Blak*

LISTASTEVNA
*Rúnar Reistrup*

Listastevnan, sum í gjár varð sett fyri triðju ferð, er enn nýggj og leitar enn eftir sínum rætta leisti. Við at skeita at skránni fyri stevnuni hómast ábendingar um at stevnan á summum økjum hevur broytt kós í mun til undanfarnu árini, og á øðrum økjum ikki.

At tónleikatiltøkini eru fækkað í tali í mun til í fjør og fyrrárið, at myndlist hevur fingið størri pláss, at stevnan í størri mun enn fyrr er savnað í Havn, og at setanin í gjár var einans fyri innboðin eru nakrar av sjónligu broytingunum.

Hinvegin er tað, sum nógv hava hildið átti at verið broytt, nevniliga atgongumerkjaprísurin, hinvegin óbroyttur.

### Hálv høll

Sum onnur ár eru atgongumerkini til Listastevnuna eisini í ár til keyps fyri prísir, sum kunnu tykjast rættiliga høgir.

Brandur Øssursson, sum seinastu tjúgu árini hevur staðið á odda fyri Jazzfestivalinum, heldur sjálvur, at tiltøkini eru nakað dýr at fara til.

- At áseta ein prís fyri eina konsert er ein spurningur um filosofi. Í mínum oyrum ljóðar tað dýrt at taka yvir tveyhundrað krónur fyri "vanligar" konsertir. Tá vit fyrireikaðu Jazzfestivalin var tankagongdin altíð tann, at tónleikurin skuldi út til fólkið, og øll fólk hava altso ikki ráð at lata 200 krónur hvør fyri at fara til konsert. Tí má man avgera við sær sjálvum, um man heldur vil taka 200 krónur og spæla fyri hálvari høll ella man vil taka 100 krónur og spæla fyri fullari høll, sigur Brandur Øssursson.

### Ikki ov dýrt og tó

Ein annar minst líka royndur fyriskipari av tónleikastevnum, Kristian Blak, hevur ilt við at kalla 225 krónur fyri atgongumerki til dømis Aldubáruna fyri ov nógv.

- Í mun til hvat Aldubáran er, so meini eg ikki at 225 krónur fyri eitt atgongumerki til teirra konsert er ov nógv. Men vit vita sum er, at hóast Havnin telur 15.000 fólk, so er tað ein bólkur av færri enn túsund fólkum, sum ganga aftur til allar konsertirnar. Og fyri hesi er tað nógv at skula gjalda yvir 200 krónur fleiri ferðir innan tvær vikur. Tí haldi eg at tað átti at borið til at keypt eitt samlað atgongumerki til alla Listastevnuna, sum gjørdi tað møguligt hjá øllum at fari til fleiri tiltøk, sigur Kristian Blak

### Brúk fyri øðrum stevnum

Teir báðir royndu fyrireikararnir eru á einum máli um at tað ikki er til nakran skaða, at talið á tónleikatiltøkum á ársins Listastevnu er minni enn undanfarin ár.

- Tað er skilligt, at Listastevnan ikki hevur so nógv tónleikatiltøk. Hon byrjar jú beint eftir fleiri tónleikafestivalar hava verið í Føroyum ígjøgnum summarið. Um ein sjónleikastavna lá beint frammanundan, so vænti eg eisini, at tað hevði avmarkað plássið hjá sjónleiki á Listastevnuni, sigur Brandur Øssursson.

Kristian Blak er heldur ikki skuffaður av, at tónleikurin fær minni pláss á Listastevnuni í ár í mun til undanfarnu árini.

- Listastevnan hevur sítt virði sum ein stevna fyri fleiri ymiskar listagreinir. Men hon kann ongantíð samstundis nøkta tørvin á tónleikastevnum. Tað, sum er, er gott, men tað er ikki nokk. Tann tónleikurin, sum er á Listastevnuni í ár, er dygdargóður, men umboðar bara ein pinkulítlan part av tí, sum tónleikastevnurnar kunnu bjóða, sigur Kristian Blak.

### Ikki nakar avloysari

Listastevnan byrjaði annars sum ein ætlað samanrenning av teimum ymsu tónleikafestivalunum í Føroyum. Á tíðindafundi hálvt ár undan fyrstu Listastevnuni í 2001 varð borið fram, at stevnan skuldi loysa Jazzfestivalin og Summartónar av.

- Vit vóru ov naiv tá at trúgva, at alt kundi sameinast, og tað funnu vit útav beinanvegin eftir fyrstu Listastevnuna. Men tað er eingin trupulleiki, tí tað ber væl til at lata Listastevnuna og tónleikafestivalar sameksistera. Tað er gott pláss fyri bæði Jazzfestivalinum, Summartónum og G! Festivalinum afturat Listastevnuni.

### Tekur frá hinum

Men eitt er at tónlistarliga er pláss fyri fleiri festivalum. Peningaliga vísir tað seg at standa verri til.

Góðar tríggjar milliónir krónur hevur Listastevnan at ráða yvir hvørt ár. Teir pengarnir skulu koma onkrastaðni frá, og tað eru stórt sæð frá somu keldum, sum onnur listarlig tiltøk skulu fáa pening til sítt virksemi.

- Tá Listastevnan byrjaði, varð sagt, at hon skuldi koma afturat tí, sum longu var, men tað hevur víst seg ikki at vera soleiðis í veruleikanum. Síðan Listastevnan er komin er tað vorðið nógv verri at fáa pening til vega til eitt nú Summartónar og Jazzfestivalin, sigur Kristian Blak.

Tí er tað vorðið nógv tyngri at skipa fyri øðrum listarligum tiltøkum restina av árinum, og tað er spell, heldur Kristian Blak.

- Tað er galdandi fyri alt listarligt arbeiði, at tað nyttar lítið at brenna alt fýrverkið av nýggjársaftan og so ikki eiga so mikið sum eina rakett til restina av árinum. Tað má man ansa eftir, tí um vit koma hartil at vit bara hava mentunartilboð tvær vikur um summarið og einki restina av árinum, so gerast vit mentunarliga fátækari enn nakrantíð, sigur Kristian Blak.



# So fóru teir

**Atli S. Petersen, Sveinur Høgnason og John Vilhelmsen fóru úr Føroyum á vatnskutara til Danmarkar týsdagin. Teir væntaðu at vera í Hetlandi um trý tíðina mikunáttina**

VATNSKUTARI
*Ingrid Bjarnastein*

**Argir:** Seinnapartin týsdagin fóru Atli S. Petersen, Sveinur Høgnason og John Vilhelmsen avstað úr Føroyum á vatnskutara, og kósin var sett. Næsta málið var Danmark.

Um trý tíðina í nátt væntaðust teir at vera í Hetlandi, og um alt skuldi gingið eftir ætlan, so skuldu teir verið í Danmark nú. Men hetta hava vit ikki fingið staðfest enn.

Til ber at lesa um vatnskutara ferðina á heimasíðuni www.watercraft.fo




*Nú er klárt at fara. Teir tríggir Atli S. Petersen, Sveinur Høgnason og John Vilhelmsen søgdu seinnapartin týsdagin farvæl við familjuna, og kósin varð sett ímóti Danmark - við vatnskutara*

*Mynd: Maria Olsen*

listastevna føroya arts festival

# Elisa Heinesen í Müllers Pakkhúsi

Hósdagin letur upp forvitnislig framsýning hjá Elisu Heinesen í Müllers Pakkhúsi í Havn. Tað er Býráðið, sum eigur søguligu pakkhúsini og framsýningin er vorðin til í samstarvi við Listastevnu Føroya.

Klædnasniðgevin. Elisa Heinesen, sum býr í London, men er ættað úr Havn, fer í Müllers Pakkhúsi at sýna fram klædnapløgg, hon hevur sniðgivið og seymað.

Elisa hevur lestrarárini lagt seg eftir at gera sjónleikarabúnar og sonevnd costume snið. Umframt at arbeiða við egnum tilfari, arbeiðir hon eisini fyri The Alternative Hair Show við 6 árligum kollektiónum, har hon bæði sniðgevur og seymar. Hetta tiltak, sum nú gongur á 21. ári, virkar fyri at savna pening til gransking innan blóðkrabba. Úrslitið verður sýnt fram í Royal Albert Hall og ferðast síðani kring knøttin.



Tvær ferðir hevur Elisa verið við í hesum árliga tiltaki. Í Müllers Pakkhúsi fer Elisa at sýna hennara part av hesi stórbæru framsýningum. Eisini sýnir Elisa partar av eini verkætlan, sum sýnd varð í Las Vegas í juli í ár. Framsýningin hjá Elisu Heinesen letur upp hósdagin klokkan 15.

## Kingo 300

Í ár eru 300 ár liðin síðani stóra danska sálmaskaldið Thomas Kingo (1634-1703) doyði. Hetta verður hátíðarhildið á Listastevnu Føroya við fløguútgávu, kirkjusangi, fyrilestri og framsýning. Tá Listastevna Føroya

2003 verður sett í Havnar Bio mikudagin 6. august kl. 16:00 verður nýggj fløga við Petru Iversen løgd fram. Upptøkur eru gjørdar í ymsum kirkjum í Føroyum, har Petra syngur úr Kingos sálmabók. Heitið á fløguni, sum Tutl gevur út, er "En Naade uden Maal".

Hóskvøldið 7. august klokkan 20:00 heldur Marjun Bæk prestur fyrilestur á Landsbókasavninum um Kingo. Samstundis letur Landsbókasavnið upp framsýning, har gamlar Kingobøkur og nýggj frímerki hjá Postverkinum, við Kingo sum myndaevni, verða sýnd fram. Kingobólkurin úr Tjørnuvík fer eisini at syngja við hetta høvið hóskvøldið. Tveir sunnudagar meðan Listastevnan er, verður Kingosangur í trimum kirkjum kring landið.

Sunnudagin 10. august kl. 11:00 syngja systkini Petra og Hans Iversen í kirkjuni í Bø. Sama sunnudag kl. 17 syngja tey í kirkjuni í Kvívík.

Sunnudagin 17. august kl. 11:00 og 17:00 syngja Niels Midjord, Petur J. Eliasen og Símun Rasmussen í kirkjuni við Sjógv. Sama sunnudag kl. 12:00 syngur Kingobólkurin úr Tjørnuvík í kirkjuni í Hvalvík.

Tað er í samstarvi við Postverk Føroya, at Listastevna Føroya ger so nógv burtur úr Kingo tiltøkum í ár.